## So fekk Marit OL-gull



Undan leygardegnum var OL-gullið einasta gullið, sum Marit Breivik vantaði í heiðursmerkjasavni sínum. Norski landsliðsvenjarin hevur sitið í sessinum síðani 1994, og nú hon fer frá komandi vár, hevur hon vunnið alt tað, sum vinnast kann. Samlaði listin telur nú eitt HM-gull, tvey EM-gull, eitt OL-gul, tvey HM-silvur, tvey EM-silvur, eina EM-bronsu og eina OL-bronsu.

## NSÍ-nevndin skipað seg

Í næst seinastu viku gjørdist greitt, at NSÍ skuldi skipa nýggja starvsnevnd, tá Dánjal Petur Hansen ikki longur var formaður. Frígjakvøldið hevði nývalda nevndin fund, og úrslitið varð, at Andrias Lamhauge er nýggjur formaður. Poul Helgi Jacobsen er næstformaður, Margret á Líknagøtu er peningarøkil, Magnus Knudsen og skrivari og fimti nevndarlimurin er Karsten Joensen.

### Ein lætti at skora

Sigursmálið í Gundadali var samstundis fyrsta málið hjá Jákup á Borg, síðani hann í summar skifti aftur til B36.

Og tí var fagnaðurin skilliga stórur. Ikki minst tí talan eisini var um sera týdningarmikið mál.

- Jubelscenan vísti alt, haldi eg. Tað var ein øgiligur lætti og eitt fornøjilsi at sleppa at skora í hesi hvítu blusuni aftur, segði Jákup á Borg eftir dystin.

- Men alt í alt, so eru tað fyrst og fremst tey trý stigini og tann fantastiski arbeiðsinnsatsurin frá spælarunum, sum hava týdning í dag. Vit fella ikki fátt, hóast vit fáa ein mann útvístan, men søkja støðugt eftir sigrinum, og tað haldi eg vera sera positivt.

*Tit eru framvegis átta stig aftan fyri EB/Streym. Er oddasessurin nakað, sum tit hugsa um?*

- Nei. Hjá okkum røður um at halda fast um annað plássið. Sjálvandi kunnu vit vóna, at EB/Streymur snávar, men tað er ikki tað, sum vit hugsa mest um, sigur Jákup á Borg.

**-mørk**

### Mugu eftir sigrinum

Hóast hann fekk eina frísparksperlu eftir bara 90 sekundum, so kundu hvørki Poul N. Poulsen ella liðfelagarnir í Skála brúka tað til nakað serligt.

- Tíverri var tað ikki nóg mikið til at fáa stig. Eg haldi eisini, at vit flyta okkum ov lítið á vøllinum. Ikki minst, tá vit eru ein í yvirtali.

*Og sum stigatalvan sær út, so eru væl ikki ráð til at fara stigaleysir av vøllinum alt ov ofta?*

- Nei, tað er tað ikki. Vit eru tvingaðir til at fara eftir trimum stigum hvørjaferð. Líkamikið, um vit spæla í Gundadali ella onkra aðrastaðni, segði Poul N. Poulsen eftir dystin sunnudagin.

**-mørk**

B36-Skála 2-1 (1-1):

# Blandað bomm í Gundadali

*B36*

*Skála*

**Tvey reyð kort, ein frísparksperla, eitt heldur løgið brotsspark og fyrsta málið hjá Jákup á Borg, síðani hann skifti til B36. Tað vóru partar av matarlepanum í Gundadali, har B36 við tíggju monnum fekk greitt sína skyldu**



*Við sigrinum helt B36 fast um silvurið, meðan tað hjá Skála nú av álvara er farið at sansa at*

*savnsmynd*

**FÓTBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

B36 mátti gjøgnum alt kensluregistarið, tá teir sunnudagin vunnu sær trý stig móti Skála.

Kjaftfiskin og vónbrotið fingu teir alt fyri eitt, tá Poul N. Poulsen sera hegnisliga skrúvaði bóltin upp um múrin og í inn um nærmasta stólpa.

Frísparkið var av tí heldur bíliga slagnum, men tað var nú skjótt, at armarnir og komu tó skjótt uppaftur. Tí bara góðan minutt seinni var dómarin í sonnum jólahýri, tá hann peikaði á brotssparksblettin í hinum endanum.

Brotssparkið bankaði Klæmint Matras í netið, og so líðandi setti B36 seg á dystin. Seinastu 20-25 minuttirnar av fyrra hálvleiki sat B36 á tí mesta, og umframt at raka træverkið tvær ferðir høvdu teir einar 3-4 100% møguleikar. Og tó at Skála hevði einar tveir heilt vandamiklar kontramøguleikar, so tóktist tað vera ein spurningur um tíð, áðrenn gestirnir máttu geva seg yvir.

Frustratiónirnar høvdu hug at finna fram til bæði spælarar og viðhaldsfólk hjá B36, og tað gjørdist ikki betri av, at dómarin flákráði nakað ríviligt í skiftandi lotinum í Gundadali. Og tá Klæmint Matras kendi seg snýttan fyri brotsspark, kókaði yvir hjá B36-liðskiparanum, sum rendi Poul N. Poulsen um koll.

Reyða kortið var sjálvsagt, men mest av øllum mundi hetta vera úttrykk fyri tær frustratiónir, sum vantandi málini og skiftandi dómaraavgerðirnar skaptu.

Í hesum umfarinum slapp B36 tó ókeypis frá at spæla undirmannaðir seinasta lítla hálva tíman av dystinum. Skála hevði í meira enn trý korter livað í hørðum trýsti, og hóast yvirtalið, so megnaðu teir ikki at flyta liðið nakað nevnivert niðan eftir vøllinum. Heldur ikki hóast teir fyrstu løtuna av dystinum høvdu fólkið óvæntað langt uppi á vøllinum. Helst í eini roynd at skaka mótstøðuna.

Og so var tað, at forloysingin kom hjá bæði Jákupi á Borg og B36. Jákup hevði sjálvur havt nakrar næskar royndir, men tá Skála ikki fekk ruddað innlegg ordiliga burtur, var hann knappur, og hesa ferð bleiktraðu meskarnir. Og so var frøin sjálvandi ovurstór á bæði spælarum og fjepparum.

Seinastu løtuna kom Skála tó aftur við í dystin. Trýstir av veruleikanum, sum nú segði, at einki stig skuldi úr Gundadali, noyddust teir orangjulittu fram á vøllin, og talan gjørdist eisini um vandamiklar støður. Størsta møguleikan fekk Pætur Dam Jacobsen, men hann varð tacklaður í evstu løtu. Og hinvegin kostaði tað eisini at satsa, tá Arnhold Berg seinastu løtuna av dystinum fekk tvey gul og harvið reytt kort.

### Skála vildi

Tað er eingin loyna, at tað í løtuni er stórt trýst á Skála.

Fyri eitt lið, sum tey flestu spáddu skuldi liggja í tyngra endanum, eru 15 stig við átta dystum eftir ikki so galið undir vanligum umstøðum.



Trupulleikin hjá Skála er bara, at umstøðurnar eru ikki vanligar. Úrtøkan hjá niðaru liðunum hevur verið óvanliga stór, og á vánaligum føroyskum má sigast, at alt bendir á eitt satt hundaslagsmál í botninum av talvuni.

Og skal Skála vera við í hesum bardaganum, so skulu trý stig á kontina næstu ferðirnar, teir spæla. Og tað var eisini tað, sum botnliðið fór eftir sunnudagin.

Fyrsta korterið var B36 eisini tikið á bóli av Skála, sum hevði tveir mans á toppinum og sera offensivar kantar, og við hepni kundi hetta verið gagnnýtt betur.

At teir so ikki megnaðu at standa ímóti trýstinum allan dystin, er ein onnur søga. Men tað var frískligt at síggja eitt lið, sum somikið óimponerað fer ígongd við trupla setningin seinasta triðingin av kappingini. Og hóast stigaleysir, so kann dysturin í so máta væl verða katalysatorurin til ein góðan endaspurt.